# Stjørnukokkurin Jacob de Neergaard vitjar Poul Michelsen

**Í dag og í morgin er virkisbygningurin hjá P/F Poul Michelsen við Hoyvíksvegin karmur um tiltakið Matur og Matgerð 2008. Høvuðsnavnið á tiltakinum er kendi danski stjørnukokkurin, Jacob de Neergaard**

MATVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Stjørnukokkurin Jacob de Neergaard er høvuðsnavnið á stóra tiltakinum, Matur og Matgerð, hjá P/F Poul Michelsen í dag og í morgin*

Tiltakið er fakligt og ætlað teimum, sum vara av matvørum bæði innan detailhandilin og innan vistarveiting, so sum matstøðum, stórkøkum, proviantteringum

Tilsamans 22 framleiðandi fyritøkur úr Føroyum og Danmark eru við í tiltakinum. Flest allar fyritøkurnar hava tað nýggjasta innan matvørur við sær, og høvi verður soleiðis at nema sær kunnleika um menningina og rákið í vinnuni.

Høvi verður sostatt at nema sær vitan og íblástur, sum aftur eigur at koma marknaðinum og brúkarunum til góða.

- Trý ymisk skeið eru fyriskipað. Eitt fyri økonomum og fólkum, sum arbeiða innan almennar og privatar stórkøkar, og eitt skeið er fyri skipskokkar. Hesi bæði skeið eru fyriskipað av okkara egnu kokkum nevniliga Jóan Petur á Stongunum og Jørgen Enghamar, sigur P/F Poul Michelsen í tíðindaskrivi.

Hinum triðja skeiðiðnum stendur kendi danski stjørnukokkurin, Jacob de Neergaard fyri.

Jacob de Neergaard er stjørnukokkur t. v. s. viðurkendur sum ein av allarbestu kokkunum í Danmark. Hann starvast á kenda matstaðnum Søllerød Kro uttan fyri Keypmannahavn.

Skeiðluttakaranir eru lærdir kokkar frá so at siga øllum matstøðum í Føroyum. Skeiðið leggur upp til at vísa nýggjar og meira spennandi matmøguleikar, geva íblástur, hækka støðið og breiðka úrvalið innan matstaðarvinnuma.

Skeiðini verða hildin í nýggju PM-caféini hjá P/F Poul Michelsen við Hoyvíksvegin.

P/F Poul Michelsen hevur havt hesi tiltøkini annaðhvørt ár nú í skjótt nógv ár, men uttan samanbering er hetta størsta og best fyriskipaða tiltakið nakrantíð, siga tey frá P/F Poul Michelsen.

Undanfarin ár hava millum 500 og 600 fólk vitja tiltøkini.



*Jørgin Enghamar og Jóan Petur á Stongum eru báðir kokkar - og sølumenn hjá P/F Poul Michelsen. Teir hava gjørt hendan sera spennandi matin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

